## Taptu í fyrstu royndini

Skotska landskappingin byrjaði aftur um vikuskiftið. Gunnar Nielsen mátti hyggja at frá beinkinum, tá liðfelagarir hansara úr Motherwell taptu 3-2 á útivølli móti Hearts. Hóast Motherwell javnaði tvær ferðir, so fingu teir einki við sær úr Hearts. Motherwell hevur, hóast ósigurin, góðar vónir til kappingarári, har málið fyrst og fremst er at minka um munin til tey bæði oddaliðini, Glasgow Rangers og Celtic. Gunnar Nielsen var á beinkinum allan dystin.

## Frem kiksaði á heimavølli

Atli Danielsen og Jón Rói Jacobsen løgdu í gjár rygg til 3-1 tap í Valby. Tað hilnaðist illa, og úrtøkan var ógvuliga soltin, tá ið Frem í dag fór undir nýggja kappingarárið í næstbestu donsku fótbóltsdeildini. Felagið hjá Atla Danielsen og Jón Róa Jacobsen tapti á heimavølli í Valby Idrætspark 3-1 ímóti Thisted. Thisted legði seg framum við tveimum málum, áðrenn veteranurin Tommy Olsen í síðsta minutti undan steðginum minkaði um munin. Í síðsta minutti staðfesti Thisted rimmar 3-1 sigurin.

# Skal vinna sær sessin

**Gunnar Nielsen, sum um vikuskiftið gjørdi leiguavtalu við Motherwell, ætlar sær at troka fyrsta valið Graeme Smith av málmanssessinum**

LEIKARASKIFTI
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*



*Gunnar Nielsen hevur gjørt leiguavtalu við skotska Motherwell FC, galdandi fram til 1. januar*

Føroyski málverjin, Gunnar Nielse, gjørdi um vikuskiftið leiguavtalu við Motherwell. Føroyingurin, sum hevur verið knýttur at Premier League-felagnum Blackburn seinasta árið, skal fram til 1. januar royna seg í skotskum fótbólti. Størsta avbjóðingin verður at vinna sætið frá Graeme Smith, sum hevur verið fyrsta val millum stengurnar seinastu árini.

### Gera alt

Eitt av sereyðkennunum hjá málverjanum Gunnari Nielsen er fyrimyndarligi hugburðurin til spælið. Hann er altíð til reiðar at stríðast, og havnarmaðurin arbeiður miðvíst fram móti sínum málsetningi.

Og nú hann skal royna seg í skotskum fótbólti hevur hann sjálvandi sett sær eitt nýtt mál.

- Eg verði her fyribils í seks mánaðir, og eg fari at gera, eg eri mentur, fyri at sláa av Graeme Smith. Vónandi sleppi eg á liðið. Málið er somuleiðis at prógva meg sjálvan og at hjálpa felagnum, sigur Gunnar Nielsen við heimasíðuna hjá Motherwell.

Kappingarneytin hjá føroyinginum er nú ikki hvør sum helst. Graeme Smith sat á beinkinum, tá føroyska landsliðið í august 2004 royndi seg ímóti Skotlandi. Hann er tó ikki skrásettur fyri nakran landsdyst. Smith hevur uppaldur í sigurvanda felagnum, Glasgow Rangers, og umvegis eina leiguavtalu í Ross County, skifti hann til Motherwell í 2005.

### Góð uppliving

Gunnar Nielsen hevur lært av fleiri frægum málverjum. Í Frem hevði Jørgen Nielsen, fyrrverandi Liverpool-málverji, føroyingin undir hond, meðan royndi Brad Friedel hevur lagt honum lag á í Blackburn.

U21-landsliðsmálverjin gleðir seg til avbjóðingina í Motherwell.

- Eg havi vant saman við fleiri frálíkum málverjum á míni yrkisleið, bæði í Blackburn og landsliðshøpi. Eg eri vísur í, at tað verður ein góð uppliving at venja við Colin Meldrum og Graeme Smith, sigur Gunnar Nielsen við heimasíðuna hjá Motherwell.

Tað er eyðvitað, at føroyingurin fyribils er komin til felagið sum eykamálverji. Hann var eisini á beinkinum, tá skotska kappingin byrjaði aftur um vikuskiftið.

Tað hevur ikki eydnast Sosialinum at fingið viðmerking hjá Gunnari Nielsen.

# Motherwell droymir enn

**Eftir 76 ára oyðimarkargongd droymir leiðslan, felagið og áskoðararnir um aftur at vinna skotska meistaraheitið. Bjartskygni er at hóma, hóast Motherwell FC rennur aftaná teimum stóru**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Tað var mett sum eitt frálíkt úrslit hjá Motherwell FC, tá felagið í farna kappingarárið endaði á triðja plássinum í bestu skotsku deildini. Altjóða luttøku og heiðursmerki hevur verið óvanligt seinnu árini. Men áskoðararnir eru framvegis svangir. Í býnum droyma teg um meistaraheitið, sum ikki er vunnið síðan 1932.

### Áhugaverd søga

Tað er eitt felag við áhugaverdari søgu, sum føroyingurin Gunnar Nielsen gjørdi sáttmála við um vikuskiftið. Hóast Motherwell Footbaal & Athletic Club hevur samfull 112 ár á baki, so hevur tað ikki eydnast at vunnið fleiri enn fimm stórar heiðrar. Gullið er sjáldsamt í felagnum, men nú eru teir til reiðar at bjóða teimum stóru av.

Áskoðararnir eru sanniliga bjartskygdir eftir flotta úrslitið í fjør. Býurin droymir um gull. Men fjarstøðan til tey stóru var ómetaliga stórur, tí 26 stig skiltu Motherwell frá Celtic, sum endaði á øðrum plássi.

Tað er ikki bara í Føroyum, at feløg leggja saman í eitt. Tvey áhugafeløg vóru í býnum fyri fleiri enn 100 árum síðan, Glencairn FC og Alpha FC nevnd at navni. Bestu leikararnir frá báðum liðum vóru bjóðaðir til eina serstaka kapping, har úrsliti vóru góð. Beinanvegin byrjaði prátið um at samanlegging, sum var veruleiki tveir mánaðir seinni. Felagið hevði sítt besta tíðarskeið í 30'unum, tá tað – hóast tað fleiri ferðir var nær við – eydnaðist at vinna higartil einasta meistaraheitið.

Motherwell FC hevur havt nógva mótgongd millum ár og dag, har serliga vantandi gullheiðursmerkini ofta hava gjørt gerandisdagin truplan. Men nú droyma tey aftur.

### Syrgiliga løtan

Helst hin mest syrgiliga løtan í felagnum var 29. desember í fjør, tá Phil O'Donnell, sum var uppaldur í Motherwell, small um. Hann var á veg av vøllinum, tá hann brádliga small í grasið. Hóast hann alt fyri eitt varð koyrdur á sjúkrahús, har hann seinni á degnum lat lív. Phil O'Donnell hevði áður umboðað Celtic og Sheffield Wednesday.

Motherwell hevur uppalt fleiri frægar fótbóltsleikarar. Ein teirra er Scott McDonald, sum nú spælur við Celtic. Framherjin hevur skotið fjórð mest mál í skotskum fótbólti nakrantíð.

### FAKTA

**Motherwell F.C.**
**Navn:** Motherwell Football & Athletic Club
**Eyknevnið:** The Well, The Steelmen
**Stovningardagur:** 17. mai, 1886
**Leikvøllur:** Fir Park, Motherwell
**Pláss** fyri 13,742 áskoðarum
**Venjari:** Mark McGhee
**Kapping:** Premier League, Skotland
**Heiðrar:** Scottish Premier League 1932, Scottish Cup 1952 og 1991, Scottish League Cup 1950